# Føroyar stevna móti Europapolitiskari kreppu

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



**Ísland er á veg inn í Europasamveldið, og landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum ger onki fyri at fyrireika Føroyar til kreppustøðuna, har ein av okkara sterkastu kappingarneytum stendur innan fyri ES, og Føroyar standa uttanfyri. Passiviteturin kann um stutta tíð fáa álvarsligar avleiðingar fyri føroyskt vinnulív**

EFTA-sinnaði landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum spælir í hesum døgum eitt vandamikið spæl.

Hetta kom týðiliga til sjóndar í einum innslagi í Degi og Viku í gjár.

Tá sóu vit, hvussu lættliga og ábyrgdarleyst, hann fer um ES-spurningin, ið er ein hin mest átrokandi spurningurin í føroyskum politikki í dag.

**Kann ikki takast fyri fult**
Í innslagnum kom fram, at landsstýrismaðurin nú metir, at Føroyar eru komnar tættari einari avtalu við ES um tey fýra frælsini: frían flutning av vørum, tænastum, kapitali og arbeiðsmegi.

Orsøkin til niðurstøðuna hjá landsstýrismanninum er, at nú eru tríggjar vørur komnar afturat upp á listan yvir vørur, sum kunnu flytast tollfrítt inn á ES-marknaðin. Vørurnar eru turkaður og saltaður upsi, krabbi og kúvingur.

Ein og hvør man duga at síggja, at hvørki nøkur tons av krabba, kúvingi ella upsa – turkaður ella saltaður – flytir Føroyar nærri teimum fýra frælsunum í ES.

Sjónarmiðið er burturvið.

Sama kann sigast um útsøgnina, har landsstýrismaðurin fyri opnari mikrofon sigur, at Føroyar kunnu vænta sær "bara at fáa tað søta" burtur úr einari samráðing við ES um áðurnevndu fýra frælsini.

Illa ber til at taka landsstýrismannin fyri fult. At maðurin kemur við slíkum sjónarmiðum ber boð um, at hann neyvan er álvarsligu uppgávu sína vaksin.

**Politiski veruleikin yvirhálar landsstýrismannin**
Tað liggur langt frá mær at pástanda, at landsstýrismaðurin sigur ósatt um europapolitisku viðurskifti Føroya. Hinvegin bendir okkurt á, at Jørgen Niclasen villeiðir almenningin og uppfinnur tann veruleikan, hann hevur so harðliga brúk fyri.

Flestu munnu síggja, at Føroyar stevna beint móti einari Europapolitiskari kreppu.

Ísland er ein av okkara størstu kappingarneytum, og landið er á veg inn í ES.

Altjóða fíggjarkreppan herjar grannan fyri norðan, og við ES-limaskapi fær landið evruna sum gjaldoyra – men eisini atgongd til tey fýra frælsini, ið Jørgen Niclasen billar fólki inn, at hann nú er um at fáa fatur á.

Meiningakanningar millum íslendingar vísa, at ES-rákið er sterkt. Onkur kanning hevur enntá víst, at ikki minni enn 70 prosent av íslendingum vilja hava ES-limaskap.

Hóast landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum roynir at skava út yvir henda veruleika, broytir tað ikki íslendsku opiniónina.

Financial Times skrivaði í grein fyri knappliga 14 døgum síðani, at íslendska uttanríkisráðið longu hevur gjørt eitt útkast til, hvussu Ísland kann søkja um ES-limaskap tíðliga næsta ár.

Keldurnar hjá Financial Times munnu hava størri trúvirði enn Jørgen Niclasen.

**Víðfevndar avleiðingar**
Objektivu ábendingarnar vísa sostatt, at Ísland helst verður limur í ES innan stutta tíð.

Føroyska útflutningsvinnan, sum í dag er í trongstøðu, fær ein sera álvarsligan trupulleika, tá henda sannlíka støða gerst veruleiki. Tá sleppur Ísland inn um ES-garðin, meðan Føroyar standa uttanfyri.

Tá fáa íslendskar fyritøkur fría atgongd til at flyta allar vørur, tænastur, kapital og arbeiðsmegi millum ES og Ísland. Og íslendskar fyritøkur sleppa frítt at flyta fisk inn á ES-marknaðin.

Við øðrum orðum nærkast Føroyar einari støðu, har vit – ikki ikki bert innan fiskivinnu men allar vinnugreinar – missa kappingarførið móti Íslandi.

Hetta er Europapolitiska kreppan, vit stevna beint ímóti.

**Landsstýrismaður ger onki**
Tað vanlukkuliga er, at landsstýrismaðurin í uttanlandsmálum onki ger fyri at fyrireika Føroyar til kreppustøðuna, sum kemur, tá Ísland er innanfyri, og Føroyar standa uttan fyri ES.

Jú forrestin.

Hann ger sær stóran ómak at gykla fyri føroyingum, at doyggjandi EFTA-felagsskapurin fer at loysa okkara trupulleikar. Og hann stríðist fyri at billa okkum øllum inn, at nú er hann nær við at fáa eina avtalu um tey fýra ES-frælsini.

Øll síggja, at neyðugt er við einum heilt øðrum og seriøsum arbeiði. Útflutningurin til ES fíggjar ein stóran part av vælferðini í Føroyum, og henda vælferð kemur í vanda, um íslendskar fyritøkur fáa kappingarfyrimunin á ES-marknaðinum. Tí mugu vit sum skjótast hava greiði á treytunum fyri, at Føroyar kunnu gerast partur av Europasamveldinum.

Tíðin rennur undan Jørgen og EFTA-hvørvisjónini.

# Dagtilhaldini – psst vekk!

PÁLL Á REYNATÚGVU
borgarstjóri



**Dugi ikki at ímynda mær tann veruleika, at dagtilhaldini, sum í fleiri ár hava víðkað og fjølgað um lívsinnihaldið hjá okkara góðu pensionistum, nú skulu fara fyri bakka. Minnist heldur ikki nakað ítøkiligt vallyfti um at dagtilhaldini skulu latast aftur**

Tað kom sum ein hvøkkur, tá tað frættist í fjølmiðlunum at dagtilhaldini ikki longur skulu fáa rúm á fíggjarlógini. Eingin fráboðan til brúkararnar. Eingin fráboðan til leiðararnar. Eingin fráboðan til tey sum vara av hesum borgaratilboði, í flestum førum, kommunurnar.

Játtanin til umsorganararbeiði fer til ymisk endamál, og eitt av teimum, er stuðul til dagtilhald til pensionistar. Mattænasta er eitt annað, sum ógvuliga natúrligt kundi verið partur heimarøktini, og er tað í veruleikanum. Tí átti mattænastan at verið skipað har hon er, í heimarøktini og ikki sum partur av umsorganarjáttanini. Dagtilhaldini eru sjálvstøðugir stovnar, hvørs innihald er, at fyribyrgja og møta trupulleikum hjá eldri fólkum í góðari tíð, og harvið at leingja um tíðini í egnum heimi. Og hendan skipanin virkar framúr væl.

Vit eru fleiri, sum seinnu árini hava stríðst fyri at ment og varðveitt dagtilhaldini í Føroyum. Hóast ágangurin mangan hevur verið harður, so hava vit í felag higartil hildið tørn. Skal tí eisini her nýta høvið at takka serliga Anfinni Kallsberg, Karsteni Hansen, Kára P. Højgaard og Vilhelmi Johannesen fyri teirra arbeiði fyri júst hesum lítla, men viðkvæma øki. Kennist eitt sindur løgið, nú ein ikki røkkur eftir fíggjarlógini, og ikki fær vart hesa skipan, tí hon eigur sín góða lut í samfelagnum.

Nú havi eg sum borgarstjóri gleðina av at hitta meginpartin av teimum, sum vitja í "Hugnanum" á Sandi, og tað er sjón fyri søgn, at dugdu vit yngru eins væl og tey, at tikið ímóti lívsins viðgongd og mótgongd, so høvdu vit góða sigling um lívsins hav. Fróðari og vónríkari fólk finst ikki, hóast alt ikki gongur við, allar dagar.

Tað skal tí vera mín vón og áheitan til nýggja almannamálaráðharran, Rósu Samuelsen, um ikki at byrja sína lívsleið sum landsstýriskvinna, við at burturbeina dagtilhaldini í landinum. Er ætlanin hinvegin at leggja økið út til kommunurnar, so eigur hon, sum hon so ofta hevur ført fram í Kommunufelagnum, at syrgja fyri at játtanin fylgir við. Alt annað er at svíkja bæði kommunurnar og pensionistarnar.

## Grind:
# Størsti mentanar- og gastronomiski arvur føroyinga

HAVGRÍMUR JOHANNESSEN
Stjóri í Burger King, og ikki minst mat- og lívsnjótari



Eitt tað størsta kvæðið og ein tann mætasta skaldsøgan, vit eiga, er júst um grind og grindadráp.

Hesin siður er rótfestur í okkum øllum og hevur verið tað í øldir. Tað ger hann enn tann dag í dag hjá ungum og gomlum.

Eingin ivi er um, at uttan gávuna úr sjónum hevði ongin okkara verið her ídag, og tað ikki bara fiskinum, men so sanniliga eisini grindini fyri at takka.

Eg minnist sum smádrongur, at eg var farin til Viðareiðis í summarfrí. Hetta var stór uppliving fyri lítla havnardrongin, har pápin ikki var tann stóri innløgumaðurin, at sleppa at spæla í fjøruni, fiska síl og ikki minst, at vit sluppu í bát at fiska høgguslokk.

Vit vóru spentur, vinmaðurin og eg, til løtan kom, at vit skuldu fara oman á støðna og til havs. Men hvat, brátt varð alt skúgvað til víks, og allar ætlanir broyttar – tað vóru grindaboð.

Vit hoppaðu upp í lastina á fyrsta bilinum og so við nógvari ferð til Hvannasunds. So at siga hvørt mansbarn fór avstað, og Viðareiðisbygd var nærum manntóm.

Hetta var eitt tað størsta upplivilsið frá mínum barndómi. Spenningurin, súsið og tað ókenda, sum vit øll leita eftir.

Nú ein er vorðin eitt sindur eldri, er spenningurin líka stórur og størri, tí nú telur eisini dygdin á lykkjuni, búffunum og spikinum, tí er tað nú betur enn tað hjá grannanum?

Umráðandi er at fáa gott tvøst og spik, tá ið skorið verður upp, og grindin verður býtt. Vit vita øll, at dygdin á tí, vit fáa á tallerkin, ikki bara er gott, um kokkurin er góður, men úrdrátturin frá hvalinum skal sanniliga eisini vera fyrsta floks.

Skal lykkjan liggja seks, átta ella 12 tímar í saltpressi? Skula búffanir liggja í edika- ella mjólkarlaka, áðrenn stokt verður, ella kanska slett ikki. Tað er júst hetta, ið ger tað at gera mat spennandi og fjølbroytt. Skula búffanir svimja í sós við nógvum róma og smakkast til við nógvum reyðvíni, ella skal vínið skiftast út við konjakki og flamberast, áhh sum tað rennur úr tonnunum. Hvat er eitt sveinagildi, ein bygdarstevna ella ein ólavsøka uttan tvøst, spik og turran fisk. At koma inn til tað stóra kalda borðið í føroyskum klæðum uttan eitt fat við angandi royki av ljósareyðum lakasaltaðum spiki, nei tað verður ikki, so leingi eg livi!

Grundin til, at eg hugleiði um hetta er, at eg hoyri og lesi í miðlunum, at fólk, ung sum eldri – og summi enntá klókari enn vit onnur, siga, at í mun til alt annað, vit koyr inn í gákin á okkum, man grind ikki vera verri enn nakað annað, hóast serfrøðingar siga okkurt annað. Púra samdur.

Hugsi um bomm, sjokulátu, E211, litevni o.a.. Hví eru allar tomatirnar líka stórar og hava sama lit? Hví eru allar agurkurnar beinar og ikki bogaðar og í ymiskari støðd sum alla aðrastaðni í verðini uttan her hjá okkum ríku og óforskammaðu evropearum? Nei, eg bara spyrji.

Hvat var hatta mann las um í dag, sum onglendingar eru farnir at selja "Moe's Bacon Bar" Eitt stórt sjokulátubar við feitum frityrustoktum roykt-um "búr" svína bacon pettum, nei gev mær ein spikbita!

Hvat árin hevur fartelefonin á heilan við at brúka hana í 30 ár fýra tímar um dagin? Mítt oyra kókar, tá ið eg havi brúkt telefonina í ein tíma. Tað føllist, sum strálir fara upp í mín lítla heila.

Men hvat hendir aftaná 43.800 tíma nýtslu – altso uttan tað at eg má gjalda Føroya Tele 1.440.000 krónur í telefonrokning? Nei, eg bara spyrji.

Hevði allur matur verið líka sterilur, verið undir líka so víðfevndum eftirliti, verið kannaður upp og niður 1000 ferðir sum alt tað, Burger King selur, so hevði lívið verið ov keðiligt.

Har er eftirlit við øllum. Ikki er loyvt at brúka ditt, ikki er loyvt at brúka datt. Vit hava ikki loyvi at keypa klútar í Føroyum, enntá sápan er ikki nóg góð hjá okkum.

Alt skal vera Burger King Inc góðkent, enntá gularøturnar koma frá góðkendum veitara úr Svøríki. Hví ikki heiman av Sandi? Tí har standa eftirlitsfólk ikki og hyggja, meðan tær grógva.

Vit muga ongantíð gloyma at liva, eti fiti, róma, sukur, nógv og gott nýbryggjað kaffi, øl, snaps, konjakk og ikki minnst gin og tonic.

Um vit gera hetta og hugsa um eitt sindur um Jesupápa, skal tað nokk ganga.

Lívið er skíti hættisligt, mann doyr av tí!